Viðmerking:

# Eitt 55 ára minni um NÍÐINGSDAGIN MIKLA 18. september 1945

Nakað eftir midnátt 18. september 1945 vaknaðu havnarfólk upp við kaldan dreym - tað hoyrdist ein hvøllur brestur um allan miðbýin, og nógv hildu, at kríggið var brostið áaftur. Onnur gittu, at tað mátti vera ein mina, sum hevði ligið óbrostin síðani heimsbardagan. Men hvøkkurin gjørdist enn størri, tá ið fólk fingu veruligu orsøkina at vita. Tað vóru nevniliga føroyingar - lokalir bumbumenn, sum høvdu roynt at spreingja Løgtingshúsini - gamla parlament okkara - við eini so sterkari bumbu, at tað var komin stórur materiellur skaði, bæði á sjálvan Løgtingsbygningin og fleiri hús í grannalagnum. Tíbetur var eingin mansskaði.

Tá lá kommunuskúlin har, sum býráðið heldur til í dag. - Vit børn vóru øgiliga forfard, táið vit skuldu í skúla morgunin eftir, tí bæði Løgting og skúli sóu ræðulig út. Løgtingsbygningurin var skeikladur á og kolsvartur av sóti í tí borðinum, sum vendi móti skúlanum. Næstan allir rútar í báðum bygningum vóru knústir.

Lærararnir vóru álvarsamir og skelkaðir, og børnini vóru sum mýs, meðan skúlastjórin, Zacharias Sørensen, helt eina hvassa røðu um syrgiliga tilburðin við okkara parlamenti.

Stutt eftir fingu vit frí, meðan handverkarar fóru undir at gera skúlan í stand aftur.

Allan mín barndóm varð debatterað um hesa beistagerð, og ikki vóru menn altíð samdir, men tey allarflestu kundu kortini semjast um, at tað vóru týðulig politisk motiv aftan fyri hendingina. Hetta var jú mitt í fullveldistíðini, har fólkaflokkurin og tann rabiati vongurin, sum seinni gjørdist til tjóðveldisflokkin leikaðu púra hysteriskt í móti sjálvsstýris-, javnadar- og sambandsflokki. Fullveldismenninir vóru nakað áðrenn hetta mundið rýmdir av tingi og saboteradu alt lógararbeidið við ikki at møta, heldur ikki til nevndarfundir.

Polariseringin var hervilig, og orðalagið hjá loysingarmonnum var ógvisligt. Teir, sum ýldu harðast høvdu yvirhøvur ikki verið í Føroyum undir krígnum, men vóru vendir heim aftur úr Danmark aftaná kríggið og vildu nú partú trútta niður í øll hini, at teir vistu best um alt. Hetta vóru ikki beskednir menn, og teir illskaðust inn á øll tey, sum vóru skeptisk, flentu ella rystu á høvdinum at teimum.

Ómegdin og illsinnið um, at heimafólkið ikki altíð tók teir so álvarliga, gjørdi teir ræduliga hatskar og desperatar. Manna millum varð tí nógv gitt um, at tað vóru hesir, sum stóðu aftan fyri brotsgerðina, men hóast politiið ásetti ein dusør uppá 5.000 kr. til tann, sum kundi hjálpa við at finna illgerðsmenninar, vórðu teir ongantíð funnir. Men, at tað vóru gløðandi fullveldismenn, sum stóðu aftan fyri bumbutilburdin, var fáur í iva um - leggjast kann afturat, at



*Tinghúsini - og húsini í grannalagnum, fingu rættuliga stóran skaða, tá menn løgdu bumbu í tinghúsið tann 18. september 1954. Hóast politiið lovaði dusør upp á 5.000 kr, vórðu bumbumenninir ongantíð tiknir*

Petur Mohr Dam, Palli Henriksen og aðrir javnaðarmenn høvdu verið í tinginum til fundar minni enn ein tíma, áðrenn bumban brast.

Tingakrossur, Dimmalætting og Sosialurin vóru øll samd um, at hetta var eitt álvarsamt politiskt álop á Løgtingið og føroyska parlamentarismu.

Tjóðveldismenn hava leingi roynt at gjørt næstan ein heilan kult burtur úr at minnast 14. september árið eftir, har 32% av teimum, sum valrætt høvdu, atkvóðu fyri loysing, meðan umleið 37% ikki vildu á val. Men hevði tað verið nakað mansevni í teimum, høvdu teir heldur minst og harmast skammardagin mikla, táið feikasta, útsaligasta og mest ómansliga álop varð gjørt á okkara Løgting. Men hesin dagur skal helst, sum so nógv annað pínligt hjá loysingarrørsluni dyljast, fortreingjast og helst hvørva úr søguni. Søgumenn tiga tað burtur, journalistar tora ikki í gongd við tað ella vita ov lítið um hesa tíðina. Helst skal alt frá hesi óhugnaligu tíð fara undir heilt, og eingin má fregnast um nakað.

Tað er synd í tí ungdómi, sum verður søguleysur ella fær hana í eini revideraðari, censoreraðari útgávu frá tjóðveldisskribentum.

Onglendingar eru so frægir, at teir hvønn 5. november, lika síðani 1605 hava hildið Guy Fawkes Day til minnis um, táið menn bara royndu at spreingja eingilska parlamentið, men vórðu handtiknir áðrenn. (Teir brenna eina strádukku og minnast The Gunpowder Plot).

Ættarliðið hjá pápa mínum kallaði konsekvent 18/9 fyri Guy Fawkes - dag, táið *okkara krútbandi* gjørdi seg inn á fólkavalda umboðstingið!

### Er nøkur analogi til í dag?

Ja, tá dansaðu menn heilt hysteriskir um gullkálvin í rituellum pundsdansi og billaðu sær inn, at alt bar til fyri nakrar milliónir pund. Í dag dansa menn um Hoydalsdrongin í vitleysum oljudansi, meðan oljubabba roynir at skipa tað vánaliga stevið. Báðir royna at trútta síðni privatu identitetsproblem úr Danmark niður yvir sakleysar heimaføroyingar. Samstundis hava teir múlabundið føroyska pressu, soleiðis at teir, sum maktina hava ikki møta nøkrum borandi ella kritiskum journalistikki. Tvørturímóti: Bæði bløð, útvarp og sjónvarp lata Landsdrongin fáa meira pláss til at stýra allari skriving og tíðindafluttningi, enn sjálvt Milosevic fær høvi til í Serbiu. Har *niðri* eru onkrir, sum tora at muta ímóti maktmisbrúkinum. Men hjá okkum er útkalt. Her er einki andaligt frælsi. Hjá okkum eru makthavararnir friðaðir; – soleiðis er vanliga ikki í nøkrum demokratiskum landi. Aðrastaðni mugu teir, sum hava makt alla tíðina standa fyri skotum og uppskot teirra verða pettaði sundur, um bert nakað er at seta fingurin á. Men hvat gera okkara tíðindamenn – teir svansa herðaklappandi rundan um varaløgna og gloypa øllum óhyrligheitum, sum dresseraðir lakajar.

Varaløgni og fullveldismenn seta dagsskránna fyri útvarpstíðindi, og hvat skal viðgerast. Okkara sonevndu journalistar hava lítið talent, minni dirvi og ongan vilja til annað enn sum bebbaræddar neytakonur at rópa halleluja, hvørja ferð harra Hoydal sigur nakað, hóast meginparturin, hesin maður sigur, eru banalitetir, ósannindi og møsn. Høvdu vit havt eina frælsa, ella óhefta pressu, hevði charlatanurin í Tinganesi ikki sloppið at manipulerað so grovt við Føroya fólki, tí tá høvdu sjalvt sunnudags-journalistarnir latið hann úr og avdúkað hann. Hetta skuldi verið uppgáva hjá eini fríari pressu, men okkara pressa er jú fjøtrað og tjóðveldisheft, undirbrotlig og Hoydalskúgað og roynir at bróta slód fyri Hoydalsrepublikkini, sum hevdi verid størsta andaliga fongsul, síðani Sovjetblokkurin skramblaði saman.

*Men lat okkum onnur minnast 18. September 1945* – tað var ein av teimum døgum, har tann fúla fullveldismuran lá heilt nakin. *Muran er ikki øðrvísi í dag,* bara betri krógvað! Í dag situr ein Macchiavelli í Tinganesi. Hvussu leingi ætla føroyingar at finna seg í farisearanum í fullveldisliðinum?

**Virgar T. Dalsgaard**



# Dulnevnið sum øll kenna

At sera hørð kapping er millum tey bæði størstu bløðini, munnu nógv vita og eisini taka undir við mær í, at best var um bæði bløðini hóraðu undan.

Eisini at Dimmalætting í hesum árinum hevur ligið klárt á odda við lesiverdugum lesitilfari (oddagreinirnar eru tó sjáldan lesiverdar).

Hon hevur eisini fleiri dugnalig blaðfólk.

Sosialurin hevur so púrastani mist flogið, er nú bara eitt einkisigandi meiningheitsblað hjá javnaðarflokkinum, og dugnalig blaðfólk halda ikki leingi á har. Hvussu vánaligur Sosialurin hevur verið í alt ár, kom so týðuliga til sjóndar 7.9.00, har knappliga ein líkinda oddagrein stóð at lesa. Fólk vórðu bilsin, tikin á bóli. Gita var um, hvør ið hevði skrivað hana og onkur væntaði, at nú fingu vit eitt frískligari blað. Men eitt tjaldur ger einki summar.

Hetta er sjálvandi láturligt, men virðingin fyri blaðnum dettur skjótt niðureftir. Tað er ikki langt síðan ein av okkara fyrrv. góðu blaðfólkum, Sjúrður Skaale, nart viðs ama evni. Tað, sum gjørdi tey dulnevndu lesarabrøvini so leiðilig var júst, at blaðstjórarnir og flokspolitikararnir misbrúktu tey. Og at øll vistu hetta. Tann vælsignaða húsmóðirin ella gamli fiskimaðurin fingu skyldina. Dulnevnd lesarabrøv vóru bara loyvd fyri teirra skyld. Hetta skal avgjørt ikki skiljast sum nøkur hóttan, tvørturímóti, men tað er fyrstu ferð, at eg í 20 ár havi ivast eitt sindur í, um eg nú tímdi at fara heim og gjalda fyri bæði bløðini. Tað eru hóast alt knappar 3000 kr. um árið.

**Steinbjørn B. Jacobsen**



Lesarabrøv:

# Vísandi til Dag og viku hóskvøldið 14. september 2000

Oman fyri nevndu býráðslimir vilja við hesum krevja, at kallað verður inn til eykabýráðsfundar fyrst í komandi viku, soleiðis at allir býráðslimir kunnu fáa eina frágreiðing um, hvat gongur fyri seg viðvíkjandi viðgerð av SEV í Kommunusamskipan Føroya.

Tað verður harðliga átalað og er at harmast um, at Sjónvarp Føroya kann bera slík tíðindi um framtíðarætlan hjá SEV, uttan at býráðslimir eru vitandi ella kunnaðir um hesa ætlan. Fyri okkum er hetta nakað heilt nýtt, sum verður borið fram. Vit meta, at hetta er eitt sera stórt og týdningarmikið mál, sum sjálvandi eigur at verða viðgjørt í Tórshavnar Býráð, áðrenn nakað verður almannakunngjørt.

Spurningurin er, um býráðsformaðurin og býráðsskrivarin ikki eru farnir út um sínar heimildir í hesum máli?

Niðurstøða okkara er, at Kommunusamskipan Føroya og tygum sum býráðsformaður fyri Tórshavnar Býráð hava sera lítla virðing fyri borgarum í kommununi og okkum býráðslimum.

*Vegna býráðsumboðini hjá Sambandsflokkinum*
**Heðin Mortensen, býráðslimur**

# Viðv. kostnaðarmiklu íløgunum til útgerð á okkara sjúkrahúsum

Føroysk Sjúkrahús kundu spart hópin av peningi til útgerð, um rætt varð borið at. Tað tykist sum leiðslan ikki hevur tær royndir, sum skulu til fyri at spara á hesum øki. Mett verður, at sparast kunnu í minsta lagi 18,75 mill. kr. um árið.

Hetta framgongur av samrøðum, sum útvarpið hevur havt við leiðandi læknar.

Ávísur adm. yvirlækni sigur enntá, at sparast kunnu 20-25% uttan trupulleikar.

Sjúkrahúsini kundu samráðst seg fram til stórar sparingar, um tey høvdu lagt seg eftir at kanna prísirnar í okkara grannalondum og í teirru egnu kommunu.

T.d. kundi útlicitering farið fram á hesum øki.

| | |
|---|---|
| Brutto | 300 mill. kr. |
| Landssjúkrahúsið | 231 mill. kr. |
| Klaksvíkar Sjúkrahús | 40 mill. kr. |
| Suðuroyar Sjúkrahús | 29 mill. kr. |

Herav eru.

| | |
|---|---|
| Lønarútreiðslur | 225 mill. kr. |
| Rakstur | 75 mill. kr. |

Vinarligast,
**Bent Joensen**
**3912 Atammik**
**Grønland**

# Skarvurin

So komu vit aftur til september, tá ið loyvt er at skjóta skarv. So er tað: »er nakað eftir av skarvi at skjóta«.

Skarvurin fór at minka í stórum, tá ið loyvt varð at skjóta skarv á sinni. Ikki varð tilskilað, hvønn hátt, hann skuldi verða veiddur. Og fylgjan var og er, at hann verður skotin frá speedbátum inn á, ella við skarvaurðarnar. Ella lagt verður í flokkin púra fyrilitsleyst. Alt verður skotið, gamalt sum ungt. Fylgjan er eftir hesi mongu ár, at skarvastovnurin er skræddur upp. Aldur og kynsbýtið er avlagað í tí sindrið sum er eftir av honum. Og fer hann sum frá líður at hvørva úr føroysku fuglafaunauni.

Vit hava eina hampuliga fuglaveiðilóg, har loyvt verður at veiða ávísar aldursbólkar til tær ymsu árstíðirnar. Og lomviga og álku á vetri.

Tað er eitt virðismikið náttúrutilfeingi, sum má røktast væl og virðiliga.

Hetta er í lagi, at loyvt verður at veiða avlopið av einum stovni.

Men skarvurin verður ikki veiddur sum tað sømir seg eina mentaða tjóð. Hann verður fyribeindur, við tí veiðihátti sum loyvt verður.

Hetta at hann er minkaður nógv, vita sjálvandi allir teir sum skjóta. Tað byrjaði við at bátur kundi fáa einar 200 skarvar. Hvat fáa teir nú?

Tað er løgið at teir sum skjóta skarv og síggja at hann bara minkar, ikki sjálvir gera vart við tað, at skarvurin ikki tolir slíka veiðu.

Skarvurin er friðleysur og hevur ongan góðan. Og verður fyribeindur við myndugleikana vælsignilsi. Hetta er heilt óvanligt í øllum mentaðum londum. Her eru Føroyar eindømi.

Í Íslandi, Noregi, Hetlandi, Skotlandi ýðir av skarvi og hiplingi. Hiplingurin varð fyribeindur. Nú eigur skarvurin tørn.

Táið ein fuglastovnur er komin niður á eitt vist, er ivasamt, um hann kann koma fyri seg av egnum ávum. Sum t.d. skarvurin, sum er føroyskur burturav, og má verða lítið blandaður við annan skarv, um yvirhøvur nakað.

Nú er bara eitt at gera, og tað er at friða skarvin burtur av. Tíverri er onki annað at gera.

Hetta ið gjørt er móti skarvinum, er brot á allar etiskar og moralskar reglur og er tjóðini til lítlan sóma. Eisini í altjóða høpi.

**Erik Mortensen**

# Felagsungdómsmøti fyri alla Eysturoynna

*Í kvøld klokkan 20 verður aftur eitt av teimum stóru felagsungdómsmøtunum í Eysturoy, har millum 200 og 300 ungdómar úr allari oynni plaga at koma saman um Guds orð. Hesaferð verður møti í missiónshúsinum í Leirvík*

Tað var í fjør, at byrjað var at hava tílík felagsungdómsmøti fyri alla Eysturoynna, og síðani hevur eitt tílíkt stórt møti verið hvørt hálvár.

Bæði á Strondum og á Glyvrum vóru um hálvttriðhundrað fólk til staðar og vænta fyrireikararnir aftur góða undirtøku hesaferð.

Nú eru tað ungdómsarbeiðini í Fuglafirði, Gøtu og Leirvík, ið skipa fyri. Tey hava fingið sjómanstrúboðaran, Torleif Johannesen at tala og ein samansettur bólkur úr Fuglafirði og Leirvík kemur at syngja fyri og leiða lovsangin.

Á annan hátt verður eisini meir gjørt burturúr skránni til eitt tílíkt stórt tiltak og millum annað verður eisini bjóðað til forbøn. Ein teella kaffimuður er eisini á skránni.

Felagsungdómsmøti í Leirvík byrjar í kvøld klokkan 20.

# Vit lova einki — uttan seriøsitet og tjóðarbygging

*Stundin er ikki komin til partapolitiskan sjálvdrátt í Føroyum. Stundin er komin til at loysa heilt grundleggjandi trupulleikar, so vit ikki enda aftur í hvirluvindunum og frumskógarlógini hjá ábyrgdarloysinum.*

Minni enn 2 ár eru eftir til løgtingsval. Tveir mánaðir eru eftir til kommunuval. Og onkur væntar kanska eisini fólkatingsval, orsakað av Evru-atkvøðuni og stríðnum um innflytarapolitikk í Danmark.

Tí er tað kanska skilligt, at bæði andstøðu- og samgonguflokkar leita upp gamlar gøtur og nú fara at lova pengar til ymisk endamál. Minni skilligt er tað, at ósannar søgur um hóttanir verða sagdar at stýra landsins fíggjarpolitikki. Og harmiligt er tað, at vanligar samstarvssiðvenjur verða lagdar til viks.

Vónandi er hetta ikki tekin um royndir at draga sundur í eini tíð, har politiskt støðufesti er altavgerandi.

Vit skulu taka alla ábyrgdina av okkara landi og okkara búskapi. Búskapur okkara er í vanda fyri stórari ovurhiting. Eitt oljuleitingarvirksemi krevur at vit dubba okkum mentanarliga og sosialt.

Vit skulu skapa øllum økjum í landinum nútímans liviumstøður.

Vit skulu rætt og slætt leggja allan dent á sjálvstøðuga tjóðarbygging.

### Fólkaræði — ikki einaræði

Einar sjálvstøðugar Føroyar krevja eitt vælvirkandi politiskt fólkaræði. Tað merkir, at vit verða ongantíð samd um, hvussu samfelagið skal skipast hugsjónarliga, vinnuliga, mentanarliga og sosialt.

Um vit krevja, at allir politiskir flokkar og allir føroyingar verða samdir hugsjónarliga um tildømis skattapolitikk, vinnupolitikk, sosialpolitikk og mentanarpolitikk, áðrenn vit kunnu gerast sjálvstøðug tjóð, so tosa vit um diktatur. Og við hesum kravi hevði onki land verið sjálvstøðugt í verðini - uttan einaræðislond.

### Skattapolitikkurin breiðkast

Tað er ongin ósemja um, at skatta- og avgjaldstrýstið eigur at lækka fyri tær lægru inntøkurnar. Men tað krevur, at hetta ikki bert gerst ein táta, ið verður uppetin í øktum innflutningi og inflasjón. Tað krevur eisini at vit hugsa skattapolitikkin í nógv breiðari samanhangi. Í dag verður vanlig arbeiðsinntøka hart skattað, meðan inntøkur av keyp og sølu av fiskiloyvum aliloyvum og øðrum sleppur undan. Ongin skattur er heldur á tí, at summi hava rættin til at troyta okkara felags tilfeingi.

Um vit fáa broytt hetta, so er tað bæði fíggjarliga og sosialt ábyrgdarfult at lækka skattin á arbeiðsløn.

### Almanna- og heilsuverk endurreisast

Ongin er heldur ósamdur um, at okkara almanna- og heilsuverk skal endurreisast, eftir at tað hevur ligið í stórum ótryggleika undir heimastýrinum. Fólk vilja eisini uttan iva fegin gjalda sín skatt til eitt vælvirkandi almanna- og heilsuverk. Men tað eru ikki hóttanir um fleiri pengar, sum bjarga hesum. Bert seriøst arbeiði og fíggjarliga forsvarligar loysnir. Eisini eitt veruligt uppgávubýtið millum land og kommunur.

### Tjóðarbygging — ikki sjálvdráttur

Tí er boðskapurin greiður. Vit skulu ikki spæla gevarar av pengum, sum tann vanligi skattgjaldarin hevur goldið til at fáa eitt gott samfelag.

Vit skulu ikki lova nakað sum helst — uttan seriøst arbeiði og eina veruliga tjóðarbygging. Sum hvílir á okkara egnu inntøkum og ikki útgjaring av pengum, sum kunnu verða burtur í morgin.

Annars eru vit við rúkandi ferða aftur á ferð í frumskógarlógina í føroyskum politikki.

**Høgni Hoydal**